# os-Kairo



## Internetið kvett

The internet does not work today.

Mahmout í móttøkuni er harmast, at vit ikki sleppa at senda teldupostar heim mikukvøldið. Í sjónvarpinum síggja vit orsøkina. Forsetin hevur syrgt fyri, at internetið er kvett í øllum landinum, so mótmælisfólkini ikki fáa brúkt facebook og twitter at organisera mótmælisgongur og senda dramatiskar myndir og filmar út úr landinum.

Komandi dagarnar er onki internet í landinum, og fríggjadagin verður fartelefonnetið eisini kvett, so vit eru uttan møguleika at samskifta við umheimin.

Leygardagin skilst, at internetið er komið í rættlag aftur, men leygarkvøldið, tá vit fara av hotellinum, riggar tað framvegis ikki.

## Oljuprísurin hækkar

Prísurin á ráolju hækkar sum ein beinleiðis avleiðing av stríðnum í Egyptalandi.

Í einum lopið hækkaði prísurin á ráolju fýra prosent fríggjadagin, samstundis sum ófriðurin var upp á tað harðasta í gøtunum í stóru býunum í Egyptalandi.

Tað merkir, at prísurin á ráolju endaði beint niðanfyri 90 dollarar fyri tunnuna, og hetta kann við tíðini merkja hægri oljuprísir í Føroyum.

Egyptaland framleiðir 700.000 tunnur av olju um dagin, men tað er bert ein sera lítil partur av oljuni, sum verður útflutt.

Orsøkin til hækkaða oljuprísin er hinvegin, at yvir ein millión tunnur fara gjøgnum Suezveitina dagliga, samstundis sum tað er vandi fyri, at stríðið í Egyptalandi bara er ein partur av einum størri uppreistri í arbiska heiminum ímóti harðrendu leiðslunum í londunum.



Egyptalandi, og tað er bara vaksið øll árini, tí hann hevur á skipaðan hátt syrgt fyri, at andstøðan í landinum er í sori við at seta leiðarar fastar og á annan hátt spjatt alla mótstøðu, samstundis sum hann eisini hevur broytt stýrisskipanina soleiðis, at tað er mestsum ógjørligt at fáa forsetan frá.

### 40 deyð

Mikudagin og hósdagin halda ógvusligu samanbrestirnir fram, og fríggjadagin, sum svarar til okkara sunnudag, fara fólk í túsundatali beinleiðis frá fríggjadagsbøn í moskuni, har eg stóð og bant lissur, at mótmæla og berjast við løgregluna.

Stríðið verður ógvuliga hart, og løgreglan brúkar vatnkanónir og gummikúlur, og táragass fyllir luftina í frammanundan skitna býnum.

Mótmælisfólkini vilja ikki slaka. Tey ganga beint ímóti løgregluni og kasta táragassgranatirnar aftur eftir løgreglufólkunum, og endin er, at løgreglan fer úr miðbýnum, eftir at 40 fólk eru deyð og yvir 1000 eru løstað.

Tað er útigongubann í øllum landinum, men um náttina eru gøturnar framvegis fyltar við óðum mótmælisfólkum.

### Forsetin svarar

Hosni Mubarak, forseti, hevur ikki verið at sæð alment síðan stríðið byrjaði, men leygarnáttina klokkan eitt korter til eitt er hann á hvørjum sjónvarpsskíggja í landinum, meðan høvuðsstøðin hjá flokki hansara stendur í ljósum loga, og fleiri hundrað fangar rýma úr fongslunum í landinum.

Men forsetin lurtar ikki eftir mótmælunum.

Hann noktar at fara frá, og leggur mótmælisfólkini undir at vera orsøkin til, at Egyptaland er vorðið eitt vandamikið stað at vera.

Hinvegin lovar hann somu reformar, sum hann áður hevur lovað, og koyrir stjórnina frá.

Fólk tysja út aftur á gøturnar, tá røðan er liðug.

Tey eru ikki nøgd og mótmælini halda fram, meðan fleiri útnytta støðuna og stjala frá hond í kaotiska býnum.

### Undantaksstøða

Stóri stuðulin hjá Hosni Mubarak hevur alla tíðina verið herurin, og hann tekur nú yvir í býunum. Stríðið steðgar fyribils, tí í mun til løgregluna, so hevur fólkið virðing fyri herinum, og harðskapurin steðgar í ein dag.

Kravið hjá fólkinum stendur kortini við, og vandi er framvegis fyri, at tað vera stórir beinleiðis samanbrestir millum herin og fólkið, og tá kunnu nógv lata lív.

Undantaksstøða verður lýst í Kairo og øðrum býum leygardagin, og øll ferðafólk verða ráddfrá at fara til Kairo og fleiri aðrar býir. Ruðuleiki er á flogvallunum, tí øll ferðafólkini vilja slepp burtur frá vandamiklu støðunum, og leygarkvøldið fara vit eisini úr Egyptalandi.

Men stríðið heldur fram, og sunnukvøldið sær út til, at stríðið ikki fer at enda enn á sinni.

Higartil hava umleið 150 latið lív.

oyrikur@yahoo.com